# Gøtumenn fáa undirhús og bátafelag

**Martin Juul Jarnskor hevur tikið stig til at leggja lunnar undir eitt undirhús og bátafelag í Gøtu. Á fundi í Glyvrahanusarhúsi, sum Martin tók stig til, vóru 20 mans, sum orðaðu eitt skriv til Gøtu kommunu. Kommunan hevur svarað og er positiv um ætlaninar**

FELAGSLÍV
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*



*– Her er nógv hent, síðan trolararnir, Tróndur í Gøtu og Jóannes Patursson, løgdu saltfisk upp í Gøtu. Vit smádreingir plagdu at skera blóðið úr uggunum á fiskinum. Lønin var 25 oyru fyri hvørji 100 stykkir, sigur Martin Juul Jarnskor, sum nú hevur tikið stig til at stovna bátafelag og fáa undirhús í Gøtu*

*Mynd: Jonhard Hammer*

Í skrivinum til Gøtu kommunu siga teir, at ynski er um at stovna bátafelag og hava eitt undirhús í bygdini, men til tess er neyðugt at hava hølir, har felagið kann halda til og hava sínar aktivitetir. Teir, ið vóru við á fundinum, skrivaðu allir undir brævið, har heitt varð á kommununa um at lata teimum gamla kaihúsið, sum í sínari tíð var fiskakjallari. Kommunan hevur brúkt hetta húsið til arbeiðsskúr hjá teimum, sum arbeiða hjá kommununi. Hesir hava nú fingið nýggj hølir at húsast í. Í skrivinum verður eisini sagt, at gongur kommunan teimum á møti, vilja teir stovna eitt felag í bygdini.

### Kommunan positiv

Martin Juul Jarnskor sigur, at kommunan hevur svarað játtandi og vil lata teimum kaihúsið til undirhús.

– Kommunan sigur, at tey nú fara at kanna húsið, og síðan fara partarnir í holt við at gera eina kostnaðarætlan. Vit ætla at gera skjótt av, soleiðis at húsið kann fáast liðugt at taka í nýtslu longu í summar.

Enn er eingin avtala gjørd um, hvør kemur at bera kostnaðin at arbeiðinum at seta húsið í stand, men Martin Juul væntar, at kommunan kemur at keypa meginpartin av tilfarinum.

Hinvegin sigur Martin seg vita um fyritøkur, sum eru sinnaðar at stuðla hesi ætlan. Hann stúrir tí ikki fyri, at ætlanin fer at stranda uppá, at arbeiðsorka og peningur fara at vanta, tá ið farið verður í gongd við arbeiðið, ið gerast skal.

Á fundinum í Glyvrahanusarhúsi var Janus í Bindibókini við sum gestur. Hann greiddi frá, hvussu teir høvdu gjørt í Vestmanna, tá ið teir stovnaðu undirhúsið.

– Í Vestmanna valdu teir onga nevnd til at taka sær av arbeiðinum, men allir, sum við vóru um tiltakið, høvdu ábyrgdina av tí, ið gerast skuldi.

Martin sigur, at soleiðis ætla teir eisini at gera í Gøtu, og tí varð eingin nevnd vald á fundinum í februar. Tískil skrivaðu eisini allir, sum vóru á fundi, undir brævið til Gøtu kommunu.

### Fasilitetir

Martin heldur, at gamla kaihúsið er stívliga 70 fermetrar stórt.

– Vit kundu í fyrsta lagi hugsað okkum ein hampiliga stóran sal, lítlan køk, wc, brúsu og eina vaskimaskinu.

Hann sigur, at hansara dreymur er, at eitt skelti verður sett á húsið, so fólk – og ikki minst ferðafólk – kunnu síggja, at her kunnu tey sleppa á wc, hvíla seg og annars njóta ein kaffimunn í frið og náðum.

– Tað líkist ongum, at fólk, sum vitja bygdina um summarið, skulu noyðast oman millum neystini at pissa, sum hann tekur til.

Martin Juul sigur, at hann eisini hevur hugsað sær, at húsið verður savningarstaður hjá fólki, sum vitja bygdina í seglbátum um sumrarnar. Hesi skulu kunna steðga inni á gólvinum, njóta ein kaffimunn, hvíla seg, sleppa undir brúsu og fáa vaskað síni klæði.

– Vit halda, at tørvur er á einum slíkum staði í kommununi, og tí vóna vit, at henda ætlan kemur undir land longu í summar.

Í fyrsta lagi verður húsið savningarstaður hjá gøtumonnum, sum vilja hittast til prát og hugna.

Stigtakarin sigur, at gongur alt væl, er ikki óhugsandi, at ein hædd seinni verður bygd omaná gamla kaihúsið.

– Hetta er eitt søguligt hús – ein fiskakjallari, har nógv virksemi var í sínari tíð.

Ája, sigur Martin Juul og brettir sær á:

– Her er nógv hent, síðan trolararnir, Tróndur í Gøtu og Jóannes Patursson, løgdu saltfisk upp í Gøtu. Vit smádreingir plagdu at skera blóðið úr uggunum á fiskinum. Lønin var 25 oyru fyri hvørji 100 stykkir, sum hann tekur til.

### Gággur og fenaður

Martin Juul Jarnskor, ið sigldi sum kokkur í 18 ár, hevur seinastu mongu árini fiskað gággur, sum hann selir útróðrarbátunum.

Hann hevur eisini fýra gásapør at taka sær av, og nú verpingin er fyri, er spenningurin stórur. Í summar ætlar hann at keypa sær einar 100 dunnur, sum skulu fitast og seinni drepast.

– Jú, mær dámar væl at fáast við eitt sindur av hvørjum, nú øll børnini eru flogin, og eg og konan eru einsamøll í húsi, sigur ein fryntligur og væl upplagdur, Martin Juul Jarnskor.

# Náttúra, neyst og gomul hús í Orkis

**Íslendingurin, Bessi Bjarnason, sum er giftur føroyskari kvinnu og býr í Saltangará, er hugtikin av føroysku náttúruni, neystunum og gomlu húsunum. Listarverkini hjá honum verða nú at síggja í Orkis á Glyvrum**

FRAMSÝNING
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Leygardagin, 3. apríl klokkan 14, letur íslendingurin, Bessi Bjarnason, málningaframsýning upp í Orkis á Glyvrum.

Maðurin, sum býr í Saltangará og er giftur føroyskari kvinnu, er 40 ára gamal. Hann er ógvuliga hugtikin av føroysku náttúruni, gomlu neystunum og húsunum, sum síggjast aftur í fleiri av hansara málningum.

Íslendingurin byrjaði at mála fyri 14 árum síðan, og fyrstu framsýningina hevði hann á Akranesi í Íslandi í 1996. Í 1998 var hann í Smiðjuni í Lítluvík, og í 1999 sýndi hann fram síni listarverk í íslendska høvuðsstaðnum, Reykjavík. Hann hevur eisini luttikið á framsýningum hjá Lions Club í Føroyum.

Flestu av teimum 30 málningunum, sum Bessi fer at sýna fram í Orkis, eru málaðir við akryl, tó hevur hann eisini nakrar akvarellmálningar. 27 av listarverkunum hava motiv úr Føroyum og trý hava motiv úr Íslandi.

Framsýningin hjá Bessa Bjarnason í Orkis verður opin til leygardagin, 17. apríl, og opið er, tá ið blómuhandilin annars hevur opið um dagarnar.



*Flestu av listarverkunum, sum Bessi Bjarnason fer at sýna fram í Orkis á Glyvrum, hava motivir úr Føroyum. Tað er serliga náttúran, neystini og gomlu húsini, su hugtaka íslendingin, sum býr í Saltangará*



# Nú er nóg mikið av gróti til ferjuleguna í Trongisvági

**Yvirfriðingarnevndin hevur givið loyvi til at gera grótbrotið inni í Líð í Trongisvági størri og sostatt er koyringin av gróti tikin uppaftur**

FERJULEGA
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*Yvirfriðingarnevndin hevur givið loyvi til at taka meiri grót í grótbrotinum í Trongisvági so nú er nóg mikið av gróti til ferjuleguna*

Arbeiðið at koyra grót til ferjuleguna í Trongisvági, er nú tikið uppaftur.

Koyringin varð annars steðgað fyri nøkrum vikum síðani, eftir at ivi tók seg upp um, hvussu nógv grót, tað var loyvi at taka úr grótbrotinum Inni í Líð í Trongisvági.

Hetta er eitt nýtt grótbrot, sum er gjørt í sambandi við ferjuleguna.

Ivi hevði tikið seg upp um, hvussu nógv tað var loyvi til at sprongja burturav lendinum og tí helt øll koyringin uppat.

Fyri at beina allan iva burtur, kom friðingarnevndin uppí. Hon gav loyvi til at víðka grótbrotið, so at tað var loyvi at sprongja meiri burturúr lendinum fyri at fáa nóg mikið av gróti til ferjuleguna.

Men hendan avgerðin skuldi eisini fyri í yvirfriðingarnevndini.

Har varð málið til viðgerðar fríggjadagin.

– Bárður Enni á byggifelagnum Articon, sum ger ferjuleguna, sigur, at á fundinum fríggjadagin, staðfesti yvirfriðingarnevndin, at loyvi skuldi gevast til at víðka grótbrotið.

– Sostatt er nú nóg mikið at grótið til ferjuleguna, sigur arbeiðsleiðarin hjá Articon í Trongisvági.

Hóast tað eru tríggjar vikur síðani at koyringin helt uppat, hevur arbeiðið upp á ferjuleguna ikki ligið stilt.

Hesa tíðina hava teir arbeitt við at seta spunsjørn í atløgubyggjuni niður, so tíðin er ikki farin fyri skeyti sum so. Og nú koyringin er tikin uppaftur, er bæði koyring við smáum gróti at leggja aftanfyri spunsjørnini í ferjuleguni og koyring av stórum gróti til sjálvan molan.

### Liðug 15. november

Nýggi Smyril kemur 12. oktober og sostatt hevur tíðin at fáa ferjuleguna lidnað, verið ógvuliga knøpp.

Tað hevur alla tíðina verið greitt, at ferjulegan fór ikki at vera heilt liðug til tá.

Men Jákup Enni sigur, at nú arbeiðið er seinkað, er ætlanin at Smyril skal kunna taka ferjuleguna í nýtslu tann 15. november. Tá verður ferjulegan ikki liðug, men atløgubryggjan verður so mikið liðug, at Smyril kann brúka havnina, samstundis sum økið tá skuldi verið asfalterað.

– Tað sum tá verður eftir, er at snøgga arbeiðið og kanska at laga eitt sindur av gróti á molan, sigur Jákup Enni.

Hann sigur, at hóast arbeiðið er seinkað, verður ikki brúk fyri fleiri lastbilum enn teimum sjey, sum alla tíðina hava koyrt.

– Sjey er eitt hóskandi tal av lastbilum. Verða bilarnir fleiri, koma teir at vera í vegin fyri hvørjum øðrum og tí er tað ikki serliga effektivt.

Enn hava teir 150.000 rúm metrar av gróti at koyra til ferjuleguna.

# Friðingin av botninum framvið Tinganesi skal nú í samgonguna

**Nú verður tað eisini ein politiskur spurningur, um tað skal verða loyvt at sprongja og dýpa framavið Tinganesi fyri at gera atløgupláss til nýggja Smyril**

FRIÐING
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*Jógvan á Lakjuni, landsstýrismaður, viðgongur, at tað verður trupult at ganga ímóti sakkunnleikanum, sum mælir frá at geva loyvi til at sprongja framvið Tinganesi fyri at gera atløgupláss til nýggja Smyril*

Nú verður tað eisini ein politiskur spurningur, um havbotnurin framvið Tinganesi skal friðast ella ikki.

Jógvan á Lakjuni, landsstýrismaður í mentamálum, sigur, at hann nú fer at taka málið um at friða havbotnin framvið Tinganesi upp á politiskum stigi.

Tórshavnar Býráð hevur ætlað at gera atløgupláss til nýggja Smyrli á Bursatanga, beint uttaná, har Norrøna liggur.

Men fyri at tað skal lata seg gera, verður tað neyðugt at sprongja á botninum framvið Tingenesi fyri at dýpa havnarlagið so at nýggi Smyril sleppur at.

Men tað dámar ikki Fornminnisfelganum og tí hevur felagið heitt á landsstýrismannin í Mentamálum um at økisfriða Tinganes heilt út á 10 metra dýpdarkurvuna.

Fornminnisfelagið stúrir fyri, at spreingiarbeiðið, sum skal til fyri at kunna dýpa havnalagið, kann fara at skaða helluna og bygningarnar á Tinganesi, sum eru av okkara allarfremstu fornminnum.

Samstundis heldur felagið, at atløgubryggjan fer at oyðileggja heildarmyndina av Tinganesi.

Sostatt liggur málið nú í hondunum á Jógvani á Lakjuni, landsstýrismanni í mentamálum.

### Kann ikki bíða leingi

Jógvan á Lakjuni sigur, at fyribils hevur hann ikki havt sundir at seta seg inn í málið, tí hann hevur akkurát fingið tilfarið.

Men hann viðgongur blankt, at hetta verður eitt sera trupult mál at taka støðu til.

– Sama, hvør avgerðin verður, fer tað at fáa stórar avleiðingar.

– Verður avgerð tikin um, at geva loyvi til at dýpa framvið Tinganesi, kann tað fáa óbótaligan skaða fyri eitt av okkara sermerktastu, friðaðu økjum.

– Verður avgerðin, at økið skal friðast út á 10 metrar, fer tað at fáa álvarsligar avleiðingar fyri suðuroyarsiglingina, sum er lívæðrin hjá suðuroyingum, tí so fær nýggi Smyril onki fast atløgupláss í Havn.

Landsstýrismaðurin í mentamálum sigur, at hann nú fer at seta seg væl og virðiliga inn í málið saman við sínum embætisfólki í mentamálaráðnum.

Men hann sigur eisini, at eftirsum at talan er um eitt so álvarsligt mál, ætlar hann eisini at reisa málið í politiskt í landsstýrinum ella í samgonguni.

– So kunnu hinir flokkarnir í samgonguni eisini sleppa at siga sína hugsan um málið.

– Hinvegin ásannar hann eisini, at Tinganes er nakað heilt serligt og tað heldur hann eisini, at allir føroyingar halda.

Sostatt heldur hann, at hetta er ein ógvuliga trupul avgerð at taka, tí tað eru nógvar grundgevingar bæði fyri og ímóti.

Men so ásannar hann eisini, at tað verður eisini ógvuliga trupult at ganga ímóti sakkunnleikanum.

– Tá ið friðingarmyndugleikar mæla mær til at friða økið framvið Tinganesi, er tað trupult hjá mær, sum landsstýrismanni í mentamálum at ganga ímóti einum slíkum tilmæli.

– Vit eiga at taka øll sjónarmið við í eini avgerð, sigur Jògvan á Lakjuni og hann at ein avgerð verður tikin nakað skjótt.

## Móti og ábit í Øravík

**Hugni, tónleikur og mótasýning er á skránni á Hotel Øravík í annaðkvøld, so tað verður eitt gott høvi hjá suðuroyingum at fara av húsum**

HUGNAKVØLD
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Í annaðkvøld verður hugnakvøld við mati, mótasýning, tónleiki og góðum ráðum um húðrøkt, á Gistingarhúsinum í Øravík í Suðuroy.

Hugnakvøldið byrjar í annaðkvøld, hóskvøldið.

Tað eru fýra klædnahandlar á Tvøroyri, sum skipa fyri og talan verður bæði um klæðir til børn og vaksin.

Teir fýra handlarnir eru CN-Wear, Frítíðarhornið, PAU og Toystovan.

Umframt mótasýningina, fer Majken Sandá, kosmitologur frá Athena í Vági, at siga frá ymiskum um húðrøkt.

Men tað verður eisini okkurt til matna Og tónleikinum stendur Tróndur Enni fyri.

Atgongumerkini kosta 100 krónur og tey fáast í handlun um, sum eru við í tiltakinum og í Athena í Vági. Seinasti møguleiki er at keypa atgongumerki er í dag, mikudagin. Men atongumerkið gevur eisini teimum góðan avsláttur, sum keypa klæðir á hugnakvøldinum.